# Tiltøk

**Konsert í Hoyvíkar kirkju**
Sunnudagin 30 jan. kl. 16 verður stórfingin konsert í Hoyvíkar kirkju við blokkfloytuspælaranum Michalu Petri saman við Jóhannes Andreasen, cembalo, Nikolaos Kapnas bratsj,og Jens Chr. Guttesen, cello.

**Hebron á Argjum**
Týskvøldið kl. 20 Bókabólkur heima hjá Elin og Jógvan, Fugloyarvegur 10.
Mikudagin kl. 10: Bønarløta fyri kvinnur. Kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. Evni. Rómbrævið v/Dj. Thomassen
Fríggjadagin kl. 10: Bønarløta fyri kvinnur og menn.
Sunnudagin Kl. 10.30 Morgunmøti. Kl. 12 Sunnudagsskúli í salinum í neðra Kl. 12.00: Møti. Evni: Einglar. Sverri Steintún talar.
Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn**
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mánakvøldið kl. 20 Møti: Talari. Marjon Poulsen
Juniorarnir skipa fyri
Týskvøldið kl. 18 Vit møta menniskjum, Vit vitja stovnar Og sambýli í Havn. Byrjað verður í Menigheithúsinum kl 18.
Mikukvøldið kl. 20 Møti: Sangløta við café-dami
Kom og syng við.
Hóskvøldið kl. 20 Møti: Tey ungu skipa fyri 3 vitnisburðar Ung, eldri, elst Sangframførsla v/ Sólfríð Mariu í Rók.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti: Talari. Símin Jacobsen. Sangur Helena, Hjørdis, Elin. Eftirmøti verur aftana.
Leygardag kl. 09.30 Foreldur og børn møtast. Kl. 20 Møt:. Talari. Kristian Fríðrik Olsen  Sangur. KFUM og K kórið úr Klaksvík. Kl. 22.30 Lovsongsfest.
Sunnudagur kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti: Talari. Hanus á Gørun. Sangur. Meinigheitskórið. Eftirmøti verður. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia Tórshavn**
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin
Mikudagin kl. 16.30 bøn fyri Ísrael og býnum. Kl. 18 delli - børn frá 3. til 6 flokk.
Fríggjakvøldið kl. 20 mammur hittast tilbøn.
Leygarkvøldið kl. 21 flare
U kl. 11 Morgunmøti, Margreth Olsen talar
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn Tórsgøta 19**
Mánakvøldið kl. 19 SKÓTAR Kl. 20.30 Streyngjakórsvenjing
Týskvøldið kl. 20 Hornvenjing
Mikudagin kl. 15 bønarmøti. Kl. 20 Cellugruppa fyri kvinnur
Hóskvøldið kl. 20 Heimaforbundi
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti. Kl. 11 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti.
www.frelsunarherurin.fo

**Katolska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/Torsten Jertzick, prestur í Mariukirkjuni. Sunnudagsskúli kl. 14.
Tað er tilbiðjan av Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjan frá kl. 15 til kl. 18. Øll eru vælkomin

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Mikukvøldið kl. 20 Møti. Verið hjartaliga vælkomin.
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, møti fyri børn frá 8 ár og uppeftir. Øll børn verða koyrd heim eftir møtið. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Verið vælkomin.
Leygardagin kl. 10 Arbeiðs/-ruddingardagur. Møtið fjølment !
Sunnudagin kl. 11 Morgundrekka. Kl. 11.30  Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/ sunnudagsskúla. Pauli Høj talar. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagur kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Bergur Debes Joensen presti. Líðandi kirkjan. Sat7.
Týsdagur kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn og juniorar.
Mikudagur kl. 19 í KFUM: Ten-sing venur. Hetta er fyri ungdómin.
Hósdagur Onki verður í KFUK vegna missiónsvikuna í meinigheitshúsinum.

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Týskvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Missiónsvika í Havn.
Sunnukvøldið kl. 18 Missiónsvika í Havn.

**Sjómanskvinnuringurin**
kemur saman í meinigheitshúsinum týskvøldið kl. 20. Allar kvinnur vælkomnar.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Mikukvøldið er bøn og sangløta kl. 20.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími. Hjartaliga vælkomin.

**Vetrarstevnan í Samljóð í Skopun**
í døgunum 28. jan. til 30. jan.
Fríggjakvøldið 28. jan. kl. 19 møti í Samljóð.
Leygardagin 29. jan. kl. 10 sangur og lovprísan í Samljóð. Kl. 19 møti í Samljóð. Kl. 22 ungdómsmøti við ungdómi úr Oasuni.
Sunnudagin 30. jan. kl. 14 sunnudagsskúli í missiónshúsinum. Kl. 18 vetrarstevnan endar við møti í Samljóð.
Hesi koma at luttaka við talu, sangi og vitnisburðum: Alfred Olsen, Árni Kjærbæk, Eivind Bæk, Jóanes Mortensen, Jacob Poulsen, Nimrod Midjord, Hallmar Winther, Hans Cristian Olsen, Regin Drangberg, Jógvan Lamhauge, Torbjørn Jacobsen, Margar Toftegård, Thomas J. Askham, Manskóri á Sandoynni, Oasubrøðurnir, Hanna og Terji Jacobsen, Mourits Viderø.
Øll eru vælkomin at verða saman um Guds orð í talu, sangi og vitnisburði.
Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um allar ævir 4ebr.13.8. Innsavnan verður til arbeiði í missiónshúsinum leygardag og sunnukvøldið.
Tilber at koma til stevnuna og sleppa til hús aftur sama kvøld. Teistin siglur av Skopun kl. 22.30. Drekka verður hvørt kvøld eftir møti. Vitja heimasíðu okkara www.jofri.dk

**Frelsunarherurin Vágur**
Mánakvøldið kl. 20 Bønarløta
Týsdagin kl. 09.30 orðið á borðið. Kl. 20 Heimaforbund.
Mikudagin kl. 14.30 Barnakór/arb.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sjómannskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar

**Kollafjarðar Missiónshús**
Mánakvøldið kl. 19.30 Juniorhugni
Týskvøldið kl. 19.30 bønarløta og bíbiltími kl. 20 við Ova Láberg. Øll eru vælkomin

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøldið kl. 20
Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið í Rituvík (Missiónsvika)**
Týskvøldið kl. 20 Meinhard Bjartalíð talar
Glyvra Streingjakór syngur.
Mikukvøldið kl. 20 Petur Martin Glerfoss talar. Jónhard, Julia og Elsebeth syngja
Hóskvøldið kl. 20 Jonhild Finsson talar. Kórið í Gøta syngur.
Fríggjakvøldið kl. 20 Torleif Johannesen talar. Tofta Streingjakór syngur. Insavnan til landsarbeiði. Barnaansing.
Leygardagin kl. 10 Morgunmátur. Bíbiltími við Øssuri Kjølbro, aðalskrivari. Evni: Sendiboð í Guds stað. Kl. 15 Barnamøti v/ Meinhard Lamhauge. Kl. 20 Silas Olofson talar. Thaborðkórið syngur. Kaffikvøld. Barnaansing
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta, Lestur. Kl. 15 Familjumøti v/ Marjon Poulsen, Sunnudagsskúlaráðgeva. Barnakóri á Skála syngur. Kl. 18 Møti – Missiónshúsið 75 ár, Pól Johannesen talar. Rituvíkar Streingjakór syngur. Nátturi. Innsavnan til missiónshúsið. Barnaansing

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mánakvøldið kl. 18 Tim 5
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti. Kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Hósdagin kl. 17.30 Liljur
Sunnudagin Einki møti vegna legu í Nesvík.

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
kemur saman til hugnaløtu í missiónshúsinum á Glyvrum mánakvøldið. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Soli Deo Gloria**
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti v/ Bjørgfinnur.
Sunnukvøldið kl. 18 møti. Poul Færø talar.

**KFUM & K í Klaksvík**
Týsdagin kl. 10 Lítlakuff
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Hilmar Danielsen 1. Pæt. kap. 4.

**Getsemane, Klaksvík**
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/ breyðbróting.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Møti v/ Pastorparinum Jan & Barbaru Skarbek úr Polen
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Osbjørn & Sólborg Joensen Barnamøti er samstundis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/ breyðbróting.

**Missiónshúsið í Vági**
Hvørt týskvøld kl. 20 er bønarmøti.

**Frelsunarherurin Vágur**
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta
Týsdagin kl. 09.30 orðið á borðið. Kl. 20 heimaforbund
Mikudagin kl. 14.30 barnakór/arb.

**Bethel, Vágur**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti. Páll Poulsen talar. Øll vælkomin

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag-hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Mánadagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er rógvimaskina, kondisúkkla, renniband og krossari.
Kl. 14-16 Nýtt telduskeið grundskeið byrjar í viku 6 (7.feb.), Páll Poulsen. Tilmelding: 316491.
Týsdagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 10 Sangur, Simme Jacobsen. Øll eru vælkomin.
Kl. 11-13 Nýtt víðkað telduskeið byrjar í viku 6 (8.feb.).
Kl. 14-16 Nýtt víðkað telduskeið byrjar í viku 6 (8.feb.), Páll Poulsen. Tilmelding: 316491.
Kl. 15 Prát. Øll eru vælkomin.
Mikudagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 9 Veving, Joana Bjarnastein.
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn eru hjartaliga vælkomnir.
Kl. 10.30 Bindklubbur.
Kl. 14-17 Prát.
Hósdagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið, vegleiðing kl. 15-16 Arnhold Fjalstein.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Lesibólkurin hittast 27. jan. kl. 11 Samskipari, Marna Olsen.
Kl. 14-16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Vit trena til kappingina í mai mðr.
Fríggjadagin
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn hjartaliga vælkomnir.
Kl. 13-16 Prát.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Pensionistafelagið í Havn**
*Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Vit hittast í Losjuni.
Limirnir hittast í Losjuni mikukvøldið 26. jan. kl. 19.
Vitjan av felagnum í Klaksvík.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*
Mánadagin Boccia í kjallaranum.
Mikudagin Hanus undir Leitinum lesur upp føroyskan skaldskap.
Hósdagin er myndavevin við Súsonnu í Jákupsstovu frá kl. 14 til 17.

**Fríggjakvøldsdøgurði í Samuelskirkjuni**
Tann 4. feb. kl. 18 stundisliga verður hugnaløta í Samuelskirkjuni á Thorsgade 65.
Til matna er gullaksfrikkadellir, kaffi og desert. Kostnaður 120 kr. Ferðafrásøgn, Dan Tórfinnsson Hansen sigur fra Danida Projektum í Eystur Afrika (mest Tanzania) 1992 - 1995. "Góðar - og minni góðar upplivingar - úr Afrika" Hevur tú hug at vera við, skalt tú ringja til Hervør á telefon nr. 36498402, ella til Sigrid á telefon nr. 42247282, í seinasta lagi mikudagin tann 2. februar. Tað er guðstænasta 1. og 3. sunnudag í hvørjum mánaða

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
*Opið er: Mánadag, týsdag og mikudag frá kl. 15-18.*

**Landsfelag Pensjónista**
*Tróndargøta 13, Tórshavn*
Tlf. 319394 ella 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.
landsfelagpensjonista@olivant.fo

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará. Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.* Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18. Øll eldri eru vælkomin*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
*dagtilhaldid@post.olivant.fo*
*Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30-17.30*
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a. Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
Er opið týsdag og hósdag frá kl. 15-18. Øll eru vælkomin.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
*Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í líkaviku frá kl. 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.*
Ogur møtast aftur í ólíka viku til somu tíð og sama stað.

## Merkisdagar

### 90 ára føðingardagur
Mikudagin 26. jan. fyllir Sanna Jacobsen á Teigum í Syðugøtu 90 ár. Dagurin verður hildin í Gørubrá frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 65 ára føðingardagur
9. feb. verður Olea Justesen 65 ár. Dagurin verður hildin í hølunum hjá frelsunarherinum 12. feb. kl. 18. Tey sum vilja halda dagin saman við mær verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 7. feb. á tlf. 312954 ella 212954.

### Brúdleyp
Leygardagin 29. jan. kl. 11 giftast í Vestmanna kirkju Maiken Streymoy og Jákup Martin á Válinum. Vælkomst verður inni á fjøðrukrógvini í Vestmanna millum kl. 14 og 17.